*Richard Hardmann, kanningarstjóri í Amerada Hess*

# Føroyingar nógvar góðar eginleikar at vera við í oljuvinnu

*-Tit hava nógvar dugnaligar og royndar sjómenn, tit eiga nakrar framkomnar skipasmiðjur og annan ídnað, sum hava stóran týdning fyri eina komandi oljuvinnu. Men fremst av øllum meti eg tykkara frálíku menniskjansligu eginleikar sum tykkara størstu styrki. Hetta sigur kanningarstjórin hjá Amerada Hess, Richard Hardmann, sum í farnu viku vitjaði fleiri vinnulívsfyritøkur, eitt nú Føroya Banka og skipasmiðjurnar.*



*Ein hugartil óvanlig sjón í føroyska bankaheiminum. Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka tekur ímóti útlendskum oljugestum*

JAN MÜLLER
ALVUR HARALDSEN

Herfyri vitjaði ein av stjórunum í stóra amerikanska oljufelagnum Amerada Hess, Richard Hardmann í Føroyum. Ørindi hansara vóru m.a. alment at boða frá, at felagið hevði sett Johan Mortensen, stjóra í Havn sum umboðsmann sín í Føroyum. Harafturat at fara undir fyrireikingarnar til eitt stórt oljuskeið, sum verður hildið í Norðurlandahúsinum 5. og 6. mars við luttøku av bæði føroyingum og útlendingum.

Undir vitjan síni vitjaðu Richard Hardmann og Andy Mitchel, sum er oyasti pressutalsmaðurin hjá fyritøkuni, ymsa staðni í Føroyum. Eitt nú hittu teir Edmund Joensen, løgmann, teir stukku inn á gólvið hjá Føroya Banka og hittu har stjórarnar Janus Petersen og Jørn Astup Hansen, høvið var eisini at vitja í Norðurlandahúsinum, har stjórin greiddi frá húsinum og tess møguleikum. Í hesum viðtangi varð eisini tosað um ætlanina at halda oljuráðstevnu í húsinum í mars. Leiðin gekk eisini út um Havnina og varð m.a. vitjað á skipasmiðjuni á Skála. Teir vitjaðu somuleiðis á skipasmiðjum í Havn.



*Útlendsk oljufeløg eru nú farin at trúgva so nógv uppá eitt føroyskt „oljuævintýr", at tey eisini vilja hava samband við føroyskt vinnulív, eitt nú peningastovnarnar. Her eru kanningarstjórin í Amerada Hess, Richard Hardmann og Andy Mitchel, pressutalsmaðurin hjá fyritøkuni saman við nýútnevnda umboðsmanninum hjá felagnum, Johan Mortensen, komnir inn á gátt hjá Føroya Banka.*

## Einastandandi dagar

Vit hittu Richard Hardmann á máli, áðrenn hann og konan fóru við bussinum vestur í Vágar í farnu viku.

Hetta hava verið nakrir sera áhugaverdir dagar. Vit hava hitt nógv fólk, og eg haldi eisini, at vit nú eru nógv betur førir fyri at siga, hvussu vit kunnu arbeiða her - og her hugsi eg serstakliga saman við føroyingum.

Richard Hardmann heldur, at føroyskur ídnaður í nógvar mátar er væl fyri og eigur eina styrki, sum kann hava nógv at siga fyri eina komandi oljuvinnu.

-Vit síggja fram til oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í mars næsta ár, og tá vóni eg, at vit kunnu fáa fram, hvussu vinnulívið í Føroyum er brynjað til at møta eini nýggjari vinnu sum hesi. Tað er av stórum týdningi at seta hol á ein mennandi og opnan dialog longu nú, ein dialog, sum eisini fevnir um spurningar, ið hava við føroyskan ídnað, føroyska arbeiðsmegi o.a. í eini komandi oljuvinnu, at gera.

Tá Richard Hardmann nevnir styrkina - hjá føroyskum vinnulívi, so hugsar hann m.a. um frálíku skipsmiðjurnar og ikki minst um allar teir mongu føroyingarnar, sum hava tilknýti til sjógvin.

-Men eg havi varhugan av, at ein tann mest týðandi eginleikin - ja styrkin hjá tykkum føroyingum - er ikki minst at finna hjá fólkinum her býr, og tá hugsi eg um tykkara góðu menniskjansligu eginleikar. Hetta er so tað, sum eg havi fingið fatan av tær ferðirnar eg havi vitjað her.

## Oljuráðastevna skal gagna báðum pørtum

Richard Hardmann vísir á, at ein av orsøkunum til at Amerda Hess skipar fyri eini ráðstevnu, er nettup at fáa fram hesar eginleikar, sum kunnu vera ein styrki hjá Føroyum sum komandi oljutjóð - men endamálið við eini slíkari ráðstevnu er eisini at fáa fram, hvat manglar og hvat tørvur er á í hesum litla samfelanum, soleiðis at tað á besta hátt er klárt til at taka ímóti tí stóru avbjóðing, sum ein oljuvinna vil vera fyri eitt samfelag.

Ætlanin við oljuráðstevnuni er m.a., at oljuvinnan kann siga føroyingum, hvat henni tørvar í sambandi við menning av hesi vinnu í einum nýggjum øki, og somuleiðis at føroyingar kunnu siga, hvat teir hava at bjóða og annars, hvat teimum liggur á hjarta.

Í tí høpi er ætlanin at hava nógvar fyrilestrarhaldarar, bæði føroyingar og útlendingar.

Eg síggi fram til at koma aftur til Føroya næsta ár og vónandi verður oljuráð-

→

eftirtektar og eru farin meira miðvíst inn í hetta stóra málið.

Hann leggur tó afturat, at bankans leiklutur enn er ikki serliga stórur. Tað verður hann kanska seinni, tá olja møguliga er funnin.

-Vit koma at standa sum ráðgevarar og kanska sum fíggjarar, og júst tí koma vit eitt sindur seinni inn í myndina.

Føroya Banki hevur sett sær fyri sum eitt tað fyrsta at kunna seg við støðuna hjá fíggingarstovnum í londum, har olja er.

Janus Petersen sigur at enda, at dyrnar í bankanum standa opnar fyri bæði føroyingum og annars teimum mongu oljufeløgunum, sum vísa áhuga fyri føroysku undirgrundini. Hann legnast um, at oddamenninir í so stórum oljufeløgum sum Amerada Hess vísa bankanum áhuga.

Tilboðsdagar
í SHOP-IN
Hósd., fríggjad.
og leygardagin hava vit hesi TILBOÐ

Hvítar buksur
fyrr: 360,-
NÚ: 198,-

Ym. blusur
fyrr: 149,-
NÚ: 88,-

Levi's 501
fyrr: 598,-
NÚ: 398,-

Troyggjur
fyrr: 329,-
NÚ: 198,-

Handil okkara er nú á tremur við øllum tí nýggjasta innan heystmótan.
Nógv nýtt heimkomið hesa vikuna

Fa. SHOP-IN
Glyvrar · Tlf. 4-7260

Handilin við tí stóra úrvalinum til hennara